VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.04.2021 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Martin Simonsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | Martin Simonsen |
| Ikki til staðar: | Rósa Samuelsen |
| Aðrir partar: | Anna Malena Thomassen, Sølvi Simonarson, Tórhallur Johansen |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 2/21 | 21/00105-7 | Mál beind í nevnd | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 68/21 | 21/00241-2 | Umsókn um byggiloyvi til Sjósavn og mentanarhús í Vágum | 4 |
| 69/21 | 21/00225-2 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina á matr.nr 208c og 99a í Miðvági | 5 |
| 70/21 | 21/00152-6 | Umsókn um loyvi at umbyggja neyst á matr. nr. 249e í Miðvági | 6 |
| 71/21 | 21/00224-3 | Mál sum hava verði fyri í ferðslunevndini | 8 |
| 72/21 | 21/00266-4 | Umsókn um stuðul til bókaútgávu | 10 |

VÁGA KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| 73/21 | 21/00277-2 | Umsókn frá Bókadeild Føroya Lærarafelags um at stuðla barnabløðunum Píka7 og Strok | 11 |
| 74/21 | 21/00263-3 | Uppskot til kommunustýrisskipan 2021 | 12 |
| 75/21 | 21/00290-3 | Uppsøgn av leigusáttmála | 13 |
| | | | |

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 2/21 Mál beind í nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.04.2021 | 2/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 27. april 2021:**

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 68/21 Umsókn um byggiloyvi til Sjósavn og mentanarhús í Vágum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 33/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 68/21 |

**Málslýsing:**

Nú eru fyrireikingarnar til nýggja Sjósavnið og mentunarhúsið komnar so mikið ávegis, at søkt verður um byggiloyvi.

Sí umsókn og tilhoyrandi tekningar.

**Viðmerkingar frá umsitingin:**

Prosjekti er ikki liðugt prosjekterað, og mælir tekniski leiðarin tí til at geva byggiloyvi, við tí treyt at umsitingin kann góðtakað prosjekti, tá tað er liðugt.

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Taka undir við umsitingini, við tí treyt at fylgt verður BK17 og byggisamtyktini

**Býráðið 27. april 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

# 69/21 Umsókn um at broyta byggisamtyktina á matr.nr 208c og 99a í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 32/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 69/21 |

**Málslýsing:**

Vága kommuna hevur fingið eina áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri partar av matr.nr 208c og 99a í Miðvági

Øki verður sera nógv nýtt av børnum at skreiða á um veturin, rulla páskaregg og ymiskt annað. At nýta øki til sethús kann føra til ein stóran miss í trivnaðinum, ið hetta økið veitir í dag.



Partar av matriklunum eru í dag í øki B: sethúsaøki, *sí kortið*, og er ynski at broyta tað til øki F: Almenn frítíðarøki.

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Taka ikki undir við at broyta byggisamtyktina

**Býráðið 27. april 2021:**

Samtykt at beina málið í mentunar- og trivnaðarnevndina.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 70/21 Umsókn um loyvi at umbyggja neyst á matr. nr. 249e í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 30/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 70/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 249e í Miðvági søkir um loyvi at umbyggja neyst.

Matrikkulin liggur í serstakari byggisamtykt A1 fyri eitt øki inni á Bakka í Miðvági.

Umsøkjari upplýsir at Gamla neysti er í so ringum standi, at støða er tikin til at ríva tað niður og byggja nýtt neyst/íbúð.

Í fyrsta lagi verður søkt um loyvi at leiga lendi sunnan- og vestanfyri matrikkulin.

Talan er um at leiga 1m av matr. 233d og uml. 4m oman í fjøruna, so nýggja neystið fluktar við útvegg á kapprórarneystinum suðureftir, hetta liggur í øki G: *Neyst, báta-, húsvognapláss, "marina" við felagshúsi*. Sí viðhefta skjal.

Í øðrum lagi verður søkt um prinsipielt byggiloyvi.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Um loyvi verður givið at leiga oman móti fjøruni, skal friðingarmyndugleikin geva loyvi at byggja

**Vinnu- og havnanevndin 12. marts 2021:**

Viðmæla at leiga umsøkjarnum matr.nr. 233d.

Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerðini av hesum málinum

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 30. marts 2021:**

Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.
Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Viðmælt at taka undir við Havna- og vinnunevndini um at leiga matr.nr. 233d
Viðmælt at geva prisipielt byggiloyvi.

Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerðini

**Býráðið 27. april 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Formansváttan:_____________

## 71/21 Mál sum hava verði fyri í ferðslunevndini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 31/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 71/21 |

**Málslýsing:**

Ferðslunevndin hevði fund um innkomin mál 18.02.2021.
Málini vóru viðgjørd hvørt sær og tilmælini frá ferðslunevndini standa út fyri hvørjum máli í viðheftu fílu.

Tekniski leiðarin mælir til at tekniska nevnd umrøður hvørt máli sær.

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Viðmerkingar gjørdar í fylgiskjalið

**Býráðið 27. april 2021:**

Mál 1: Einmælt samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd, fyri at endurskoða økini við niðursettari ferð í kommununi.

Mál 2: Meirilutin samtykkir at lata Húsabrekku upp aftur og gera vegin einsrættaðan niðaneftir, í samráð við Ferðslunevndina.
Albert Ellefsen atkvøddi ímóti.

Mál 3: Meirilutin samtykkir at taka undir við teknisku nevnd
Dagbjørn Hansen atkvøddi ímóti.

Mál 4: Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingini.

Mál 5: Samtykt at taka undir við teknisku og gera gonguteigin væl upplýstan.

Mál 6: Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingini.

Mál 7: Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum í ferðslutrygdarætlanini.

Mál 8: Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Mál 9: Ein ætlan um gonguteigin er gjørd í ferðslutrygdarætlanini. Einmælt samtykt at taka undir við ferðslunevndini.

Mál 10: Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingini.

Formansváttan:__________

Mál 11: Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingini.

Mál 12: Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingini.

Mál 13: Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Mál 14: Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 72/21 Umsókn um stuðul til bókaútgávu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 32/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 38/21 |
| 3 Býráðið | 27.04.2021 | 72/21 |

**Málslýsing:**

Í samband við 100 ára dagin hjá Vatnsoyrum, arbeiðir Dánjal Poulsen við at skriva eina bók um Vatnsoyrar, sum ætlandi skal gevast út á 100-ára degnum. Í hesum sambandi verður søkt um stuðul á kr. 25.000 frá kommununi.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. april 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 14. april 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 27. april 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

# 73/21 Umsókn frá Bókadeild Føroya Lærarafelags um at stuðla barnabløðunum Píka7 og Strok

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 37/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 40/21 |
| 3 Býráðið | 27.04.2021 | 73/21 |

**Málslýsing:**

Bókadeild Føroya Lærarafelags søkir um stuðul til barnabløðini Píka7 og Strok. Søkt verður um, at kommunan letur kr. 100 fyri hvønn næming frá 0. flokkið til og við 7. flokk, soleiðis at øll børn í hesum aldursbólkinum kunnu fáa bløðini ókeypis í eitt ár.

Umsóknin hevur verið viðgjørd í kommunufelagnum og stýrið viðmælir øllum kommunum at stuðla. Tað er eingin 0. flokkur í Skúlanum á Giljanesi, men tað eru uml. 210 næmingar í 1. til 7. flokki í Skúlanum á Giljanesi.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. april 2021:**

Viðmælt. Fíggjast við eykajáttan til skúlan.

**Fíggjarnevndin 14. april 2021:**

Mælt verður til at veita stuðul og eisini at taka tey 6 ára gomlu børnini við. Samlaði kostnaðurin verður uml. kr. 25.000,- og verður fíggjað av kontoini «stuðul til mentan»

**Býráðið 27. april 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 74/21 Uppskot til kommunustýrisskipan 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 24/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 09.04.2021 | 12/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 36/21 |
| 4 Býráðið | 27.04.2021 | 74/21 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur arbeitt við eini nýggjari kommunustýrisskipan fyri Vága kommunu. Undanfarna býráð samtykti at gera broytingar í kommunustýrisskipanini í 2017, men varð sjálv kommunustýrisskipanin ongantíð formelt broytt. Við hesum uppskotinum er tann broytingin við, umframt at aðrar konsekvensbroytingar og dagføringar eru gjørdar.

**Vinnu- og havnanevndin 09. april 2021:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini

**Fíggjarnevndin 14. april 2021:**

Mæla til at taka undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini

**Býráðið 27. april 2021:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 75/21 Uppsøgn av leigusáttmála

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 43/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 75/21 |

Viðgerðin av mál 75/21 var fyri afturlætnum hurðum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 20:45

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Martin Simonsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:____________